**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

## Endurlýsing

**Við tað, at eingin umsókn kom inn verður hendan lýsing lýst av nýggjum:**

**Á Medisinska deplinum** er starv sum læknaskrivari á starvsbrøki 0,85 leyst at søkja fyri læknaskrivara í farloyvi fyri setan 1. august 2004 ella eftir avtalu til og við 31. juli 2005.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103 ella á e-post saunn@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 21. juni 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um starv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Pedagogar/ hjálparfólk

Søkt verður eftir 5 pedagogum, at byrja 16. august 2004. Somuleiðis søkja vit eftir avloysara fyri hjálparfólk í farloyvi 21 t. v, lønarstig 1/5, í tíðarskeiðnum

1. september 2004 til 31. august 2005.

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár sum eru bólkaði soleiðis :

- 1 vøggustova á 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár. Til hesa stovu søkja vit eftir 2 pedagogum, 1 á 36 t.v., og 1 á 30 t.v.
- 3 barnagarðsstovur á 21 børn í aldrinum 3 til 5/6 ár. Til hesar stovur søkja vit eftir 2 pedagogum, 1 á 34 t.v., og 1 pedagogi á 30 t.v.
- 1 forskúlastovu á 21 børn í aldrinum 6 til 7 ár. Til hesa stovu søkja vit eftir 1 pedagogi á 30 t.v.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevnir.
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi.
- Skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur ábyrdarkenslu.

**Vit kunnu bjóða tær :**
- Ein stovn í menning, hvar tú fart møguleikan at seta tín dám á daglidagin.
- Ein vælvirkandi starvsfólkabólk.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi.
- 94 praktfull børn.

Vit vanta at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 10 / 16.

Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsøknir saman við avritum av prógvi og viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2004.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Marjun Lassen á tlf. 455557 lokal 10.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
Fo – 700 Klaksvík


**Góðska á hægsta støði, hevur eitt navn!**
Spyr sjálvandi eftir
ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR



# Gerið kvettið:

**1 Echostar boks og 1 skermur**

**Við í prísinum eru:**
- **10 rásir frá BBC**
- **4 andaligar rásir**
- **1 barnarás**
- **2 filmrásir**
- **3 tíðindarásir**
- **og fleiri aðrar**

Fyri einans **2.995,-**

**Allar eru gjaldsfríar rásir**

**Dragon modulir, ið kenna næstan alt, eru nú aftur at fáa fyri kr. 1.500,-**



**Alt til parabol og sjónvarp nú á goymslu, so sum motorar modulir og mangt annað**

**Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 21 53 28**




Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline



**Handilsinnbúgv til sølu**

Innbúgvið umfatar hillar, skiftingarrúm, disk, kassatól, ginur og akslatrø

Passar til høli ið er uml. 60 - 100 $m^2$

**TEL 31 10 99 / 21 76 67**



# Toyota - dele

**brugte og nye**

Vi sender hver dag til Færøerne

AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk



# Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg



*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*




# Almannastovan

## Stuðulsfólk

Almannastovan søkir viðh esum eftir stuðulsfólki 30 tímar um vikuna til 6 ára gamalt barn í Suðuroy.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- At seta krøv eftir førleika barnsins og sýna tolsemi
- At arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt
- At samstarva við stovn, foreldur og onnur

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir.

Starvið verður at seta sum skjótast og er í mesta lagi játtað í eitt hálvt ár.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnaforsorgartoymið, Sigrun Bærentsen, á tlf. nr. 35 35 10 gerandisdagar millum kl. 9.00 og 15.00.

Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera

**Almannastovuni**
J. Broncksgøta 27 · Postboks 3096 · 110 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi 15.06.04.

# Frítíðarskúlin á Oyrarbakka

Vegna at størvini í frítíðarskúlanum eru umnormeraði, galdandi frá 1.8.04. skal hervið verða søkt eftir

2 hjálparfólkum á 27,5 tímar
1 leiðari á 30 tímar

Leiðarastarvið verður sett fyri eitt ár, ella til flutt verður inn í nýggja dagstovnin, sum er í gerð og skal verða liðugur áðrenn summarfrítíðina 2005.

Frítíðarskúlin er fyri børn í Norðskála-Oyrarskúla, 1.-3. flokk. Aftaná summarfrítíðina verða 23 børn á stovninum, tey koma á stovnin tá tey eru liðug í skúlanum 1. og 2. flokkur kl. 11.30.

Arbeiðstíðin hjá hjálparfólkunum verður tí roknað frá kl. 11.30 til kl. 17.00.

Løn sambært sáttmála Pedagogfelagið/KAF.

Umsóknskal vera Sunda kommunu í hendi seinast týsdagin 15. juni 2004.

Hava tygum spurningar eru tygum vælkomin at ringja til kommunuskrivstovuna.

**Sunda kommuna**
460 Norðskála
tlf. 422113 · fax 422575
E-mail: sundakom@post.olivant.fo

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Søkt verður eftir Fulltrúa til KT-fyrisiting

Í sambandi við at KT-fyrisiting verður sett á stovn í Vinnumálaráðnum verður søkt eftir fólki at uppbyggja nýggju fyrisitingina. Fyrisitingin skal taka sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild.

Fyrisitingin skal eisini vera skrivstova hjá KT-forum, ið er samstarvsforum fyri øll aðalráðini viðvíkjandi KT og hevur til uppgávu

- at orða uppskot til ein KT-politikk fyri landsfyrisitingina,
- at meta um innan hvørji øki fyrimunir eru av at samstarva og/ella samskipa og gera tilmæli um, hvussu hetta eigur at verða skipað,
- at tryggja samstarv um felags greiðsluevnir.

Fremsta uppgávan í løtuni er at virka fyri, at felags KT-trygdarpolitikkurin, sum KT-forum hevur fyriskipað, verður settur í verk fyri landsfyrisitingina.

**Førleikakrøv:**
- Hægri útbúgving so sum cand. merc., cand. polyt., cand. scient. pol. ella aðra viðkomandi hægri útbúgving.
- Kunnleika og royndir innan EDV og almenna ella privata fyrisiting.
- Dugir væl føroyskt og enskt.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalráð.

Umsókn við prógvum o.ø. skal verða send til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

**Freist:**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2004. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Arna Poulsen, tlf. 356070.


**Í SAMBAND VIÐ AT O.K. HEILSØLA & MASKINUR HEVUR 13 ÁRA FØÐINGARDAG**

**HAVA VIT OPIÐ HESAR TÍÐIR**

**FRÍGGJADAGIN 4. JUNI KL. 08-21**
**LEYGARDAGIN 5. JUNI KL. 09-17**

**LEYGARDAGIN BJÓÐA VIT KAFFI OG OKKURT TIL BØRNINI**

**ØLL VØRA Í HANDLINUM 13%**
**ONNUR SERTILBOÐ ERU EISINI**

**STØKK INN Á GÓLVIÐ OG SÍGGJ OKKARA STÓRA ÚRVAL**

Handilin á kajuni
í Hvalvík • Tel. 422 394

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR



KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini



WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Faroe Marine Products

**FO-520 Leirvík**

Í sambandi við útbygging og økt virksemi á virkinum verður við hesum søkt eftir:
- Smiði/handverkara,
- Arbeiðsfólki til skiftivakt at passa turkingina, truckloyvi krevst

Eisini verður søkt eftir:
- Vaskifólki til fabrikkina

Vinarliga setið tykkum í samband við okkum á telefon: 443399